# Havnar Bio

kall
Coca-Cola

UMMÆLI:

## Tosandi bilar:

# - Fittur og góður barnafilmur frá Disney



**»Bilar« er ein flott gjørdur animatiónsfimur frá Disney, rættiliga genialur við ótrúligum tónleiki allan vegin. Disney fyritøkan hevur gjøgnum árini givið okkum barnafilmar sum Alice in Wonderland, Snjóhvíta og Bambi. Filmar, ið ofta bygdu á kendar figurar frá ævintýrum, ið vit øll, børn og vaksin, skilja og dáma. Seinastu árini er Disney farin at kappast um at gera teknifilmar, ið nærum allir eru aktionfilmar, so um Toy Story, Litle Chicken og filmar um Buzz Lightyear, sum er hetjan frá hesum filminum. Við Bilar er Disney so farin inn á marknaðin fyri filmar til børn, ið dáma bilar, hetta serliga smádreingir**

FILMSUMMÆLI
*Kim Simonsen*

Ein av nýggjastu figururin hjá Disney er ein lítil høsnarungi, ið bert eitur Little Chicken, ella Lítli Høsnarungin. Hesin er ikki soleiðis víðari sjarmerandi, kanska eitt sindur fittur, tí hann er lítil og hevur brillur. Nógv meiri sjarmerandi er filmurin Bambi 2, ið meiri eri tráð við gomlu uppskriftina við at gera filmar um ævintýr. Nú er so hesin bilafilmurin komin. Ein dýr og stórsligin framleitsla, men her er for nógv avtion haldi eg.
Disneyfelagið hevði eina stóra framgongd við filminum The Lion King í 1994, men síðani hevur tað ikki gingið so lætt hjá teimum, tí eru tey helst nærum desperat eftir at skapa ein nýggjan »darling«, ið so skal vera hesin Lítli Høsnarungin og tað er helst tíð, at Bambi er gjørdur av nyggjum og hesin filmurin um tosandi rasarabilar.

Betur enn Litle Chicken
Eg var vónsvikin av at Disney, ið plagdu at borga fyri góðsku, nú ofta ger innantómt undirhald, har fíggjarfrøðingar og trendgranskarar avgerða hvat animatións- og teknifilmar skulu snúgva seg um, so teir kunnu raka ein hugsaðan málbólk, ið eru ókritiskar barnafamiljur, ið skulu rænast. Við Biler er tað ikki so galið, tí søgan heldur og filmurin er rættuliga góður og gott gjørdur.
Her er ikki ein algoystur og tivandi upphitaður stemningur, men stillar løtur og so er tónleikurin ofta góður.
Her liva Disney upp til teirra navn. Meðan filmurin ”Chicken Litle” var ein av teimum ringastu Disneyfilmunum, ið nakrantíð er gjørdur, so var Bambi 2 og nú Biler til at halda út, kanska ikki ein komandi klassikari sum Bambi frá 1942 var tað, men tó ein ok barnafilmur, ið er verdur at síggja hjá børnum.

### Søgan

Søgan í filminum er heldur tunn, minti meg um hesar 70ara bilfilmarnar, bert fyri børn. Tríggir bilar vinna eins nógv stig í kappingini Stempe Cup, teir eru Meistarin – Tom Kilerem, Ronny Ræs og so hin nýggi Lynet McQueen. Hesir skulu møtast í Kalifornia. Síðani gongur leiðin, sum ein annar barnaroadfilmur. Lynet McQueen verður seinkaður, tí hann dettur av bilinum, ið skal koyra hann tvørtur um USA. Hann kemur at gera skað á Route 66 býin Kølerkildekøbing. Hann sleppur ikki víðari, fyrr enn hann ger alt í lagi aftur. Her eru nógvir løgnir bilar, so sum Sally, ein lekkur Porsche við flottari reyv. Har er kranbilurin Bumle, ið er ein bilur við einum ”hjarta” av gull.
Doc Hudson er sjálvandi lækni og dómari. Honum dámar ikki rasarabilar. Her er Ramone, ið er sera forfengeligur bilur. Og Flora, ið bjóðar gott bensin. Luigi hevur ófør hjól.
Alt endar við, at rasarabilurin Lynet McQueen fer at kappast, men hann sær, at tey í bygdini hava sera nógv at bjóða honum, so sum vinarlag og hann gerðst góður við hinar bilarnar. Ein sera uppbyggjandi søga.
Tað er púra vilt at hoyra Paul Newman og Owen Wilson leggja røddir til, saman við Michael Keaton. Á donskum eru eisini kend folk sum David Owe, Ole Ernst, Annette Heick, Mads Mikkelsen.
Eitt tað besta við filminum er geniali tónleikurin, og sera flotta telduanimatiónirnar. Her eru løg eftir James Taylor (sum eg elski sera nógv), Chuck Berry, Sheryl Crove, Hank Williams og John Mayer og onnur. Hetta er tann teknifilmurin í heiminum við besta tónleikinum. Heldur brúka James Taylor og Hank Williams enn at gera lortatóneleik sum í Chicken Little. Tað er vert at fara inn á heimasíðuna hjá filminum, bert fyri at hoyra tónleikin.
Hetta er ein stullig søga um samanhald, kærleika og um at finna sitt stað í lívinum, um ævig tema sum allir góðir teknifilmar altíð arbeiða við, ið er ævintýri einki annað.

***5 stjørnur av 6 til Cars.***

TÍÐIRNAR:

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**




### Biler
*FRUMSÝNING*

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 01.09 | kl. 16.00 | kl. 18.30 |
| Leygardag | 02.09 | kl. 16.00 | kl. 18.30 |
| Sunnudag | 03.09 | kl. 15.30 | kl. 18.00 |




### Snakes on a plane
*FRUMSÝNING*

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 01.09 | kl. 21.00 | kl. 23.30 |
| Leygardag | 02.09 | kl. 21.00 | kl. 23.30 |
| Sunnudag | 03.09 | kl. 20.30 | kl. 22.45 |




### Sprængfarlig Bombe

| | | | |
|---|---|---|---|
| Hósdag | 31.08 | kl. 19.30 | kl. 22.15 |
| Fríggjadag | 01.09 | kl. 20.30 | |
| Leygardag | 02.09 | kl. 20.30 | |
| Sunnudag | 03.09 | kl. 19.30 | |




### Miami Vice

| | | |
|---|---|---|
| Hósdag | 31.08 | kl. 21.45 |
| Fríggjadag | 01.09 | kl. 23.00 |
| Leygardag | 02.09 | kl. 23.00 |
| Sunnudag | 03.09 | kl. 20.00 |




### Peter Pedal

| | | |
|---|---|---|
| Hósdag | 31.08 | kl. 17.30 |
| Fríggjadag | 01.09 | kl. 18.00 |
| Leygardag | 02.09 | kl. 18.00 |
| Sunnudag | 03.09 | kl. 17.00 |




### Garfield 2

Hósdag 31.08 kl. 17.00 *Seinasta sýning*